# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gunnar Konoy, Keypmannahavn,** andaðist í Silkeborg 13. juli. Jarðarferðin verður leygardagin 28. juli 2007, kl. 12.00 frá Tårbæk Kirke, Edelslundsvej 2, 2930 Klampenborg.

**Mikkjal Petur Eliassen**, ættaður av Kirkju, búsitandi í Havn, andaðist í heiminum sunnudagin 22. juli, 58 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Agnas Nielsen**, fødd Danielsen ættað úr Tórshavn búsitandi í Asperup á Fyn, andaðist leygardagin 21. juli 86 ára gomul. Kórseting verður í Roerslev Kirkju mikudagin 25. juli.

Kistan við **Annebeth Johansen** av Strondum fer av Ellisheiminum í Runavík og í Sjóar kirkju, í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sjóar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Annabeth kunnu lata eina gávu til Sjóar kirkju.

**Johanna Hansen**, ættað av Strondum, búsitandi í Havn, andaðist á Landsjúkrahúsinum 22. juli, 66 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†

**Gunnar úr Konoy**

f. 09.04.1943 d. 13.07.2007

Gunnar bisættes fra Tårbæk Kirke lørdag den 28. juli 2007, kl. 12.00.

**Familien**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra unnusta mín, okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jóhanna Hansen**
ættað av Strondum,
búsitandi í Havn,

andaðist á Landssjúkrahúsinum 22. juli, 66 ára gomul.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*
**Johnny**
**Kári, Heidi og Sanna**

**Dagurin**
Jákupsdagur. Dagurin verður hildin til minnis um tann ápostulin, sum verður róptur Jákup tann Eldri. Hann var sonur Sebedeusar og bróðir Jóhannesar. Hann var tann fyrsti av ápostlunum, sum varð tikin av døgum fyri trúgv sína

# Minningarorð um starvsfelaga okkara Signy Remberg

**F. 31. des. 1940 · d. 15. juni 2007**

Ikki vardi tað okkum, at seinasti dagin Signy fór heim sjúk úr arbeiði, skuldi verða hennara seinasti arbeiðsdagur á Hvíldarheiminum Naina, sjálvt um vit vistu, at hon hevði verið sjúk og var byrjað aftur at arbeiða eftir nýggjár.

Signy var fødd og uppvaksin í Funningi. Hon var elst av fimm systrum.

Tað var á Hvíldarheiminum Naina, vit komu at kenna og arbeiða saman við Signy - hon var køksleiðari á Hvíldarheiminum.

Signy fór ung at arbeiða í køkinum á Landssjúkrahúsinum, tá Alexandrines Hospital. Í køkinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi arbeiddi hon eisini í nøkur ár. Hon fann sær jú mann úr Froðba, Ova Remberg, men fluttu tey seinni til Havnar at búgva.

At matgera skuldi verða lívsstarvið hjá Signy. Hetta lá eisini væl fyri hjá henni. Hon gjørdi sær altíð sera góðan ómak fyri at fáa matin at smakka væl. Hon var eitt álitisfólk og fyrimyndarliga stýrdi hon køkinum.

Signy dugdi væl til hendurnar, so skuldi eitthvørt seymast ella skuldi dekoratiónir gerast til jóla á Hvíldar-



heiminum, var tað altíð hon, ið átók sær hesa uppgávu.

Altíð var hon góð í ráðum, um vit høvdu okkurt at spyrja um.

Vit minniast aftur á nógvar hugnaligar løtur bæði á arbeiðsplássi og ikki minst á øllum útferðum. Vit plagdu jú at fara eina útferð saman hvørt summar.

Seinastu summar vóru vit í allarbesta veðri suðuri í Sandoynni og høvdu ein ógloymandi dag saman.

Tað er undarligt at koma til arbeiðis um morgnarnar og ikki at síggja Signy, tí hon var altíð har. Hon var tann, sum møtti fyrst. Vit koma jú allar framvið køkinum, tá vit møta til arbeiðis, og har var Signy í ferð við at gera morgunmatin kláran, men nú er hennara pláss tómt.

Góða Signy! Vit hava allar so ómetaliga nógv at takka tær fyri. Tað kennist so óveruligt, at tú ikki skalt vera ímillum okkum meira. Tað eru so mangir ósvaraðir spurningar, og tað er so nógv, sum vit kundu havt sagt hvørji aðrari.

Tú vildi havt fylt 67 ár nýggjársaftan, og ætlaði tú tá at gevast at arbeiða, gerast pensiónistur og sostatt njóta títt otium. Men soleiðis skuldi ikki vera.

Vit hava djúpastu samkenslu við Ova, synum, verdøtrum, ommubørnum og systrum.

Vit lýsa frið yvir minnið um Signy Remberg.

**Starvsfelagarnir**

# Randi Gunnarsdóttir á Hafnia



TÍÐINDASKRIV

Í hesum døgum hevur Randi M. Gunnarsdóttir framsýning við akrylmálninum á Lobby-ini á Hotel Hafnia. Framsýningin byrjaði 1. juli og hongur uppi til og við 31. juli.

Randi M. Gunnarsdóttir er ein teirra sum skipaði fyri einum skeiði í máling, seyming og tøving í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í døgunum frá 20. til og við 22. juli. Í hesum sambandi nevnir hon, at vegna góðu undirtøkuna byrjar eitt nýtt skeið 10. august. Til ber at tegna seg á tlf. 266575 (Randi) ella 224253 (Unn).

# Max Degn í Haraldsstovu settur deildarleiðari á MRCC Tórshavn

Tilbúgvingarstovnur Føroya hevur sett Max Degn í Haraldsstovu í starv sum deildarleiðara á MRCC Tórshavn. Max er 41 ár og ættaður úr Havn. Max er útbúgvin skipsførari og fiskarítøkningur.

Max hevur seinastu 10 árini siglt sum yvirmaður við skipum hjá A.P. Møller. Max tekur við starvinum síðst í september mánað.